Nógv tann størsti parturin av limunum í fólkatinginum mælir veljarunum til at atkvø›a ja í dag. Hesin meirilutin endurspeglast kortini ikki í veljarakanningunum, sum vísa, at ta› at kalla stendur á jøvnum millum ja- og nei-sí›una

Mynd: Jens Kr. Vang

Trupla vali›

***Bakgrund:** Vali› um gjaldoyra› fellur dønum trupult. Hava teir ta› nóg gott vi› krónuni, ella skulu teir skifta hana út vi› evruna og taka vi› øllum, sum vi› evruni fylgir? Ta› er eitt val um anna› og meira enn pengar*

Magnus Dam
Keypmannahavn

Naka› løgi› er hent, nú danskir politikkarar í longri tí› hava roynt at grei›a veljarunum frá fyrimunum og vansum vi› n‡ggja evropeiska gjaldoyranum. Flokkar, i› vanliga eru argastu fíggindar, hálsfevnast tvørtur um floksmørk um sama mál, og flokkar, i› vanliga samstarva væl, rópa í holi› á hvørjum ø›rum í hvørjari tí›indasending. Evruvali› hevur upployst floksmørkini í Danmark – eina løtu í øllum førum.

Á ytsta høgravongi hálovar Pia Kjærsgaard úr Danska Fólkaflokkinum krónuni og øllum, sum krónan stendur fyri. Vi› somu tungu tosa› Holger K. Nielsen úr SF og Keld Albrecthsen úr Eindarlistanum yviri á ytsta vinstravonginum. Flokkarnir hava funni› felags stev um at var›veita donsku krónuna.

Samstundis standa Poul Nyrup Rasmussen úr Javna›arflokkinum, Bendt Bendtsen úr Konservativa Fólkaflokkinum og Anders Fogh Rasmusssen úr Vinstra sum ein ma›ur. Og undir li›ini á teimum standa Radikala Vinstra og CD. Teir fimm flokkarnir hava somulei›is funni› eitt felags mál, og ta› er at sleppa av vi› donsku krónuna.

Skal ta› ver›a hendan sum ver›ur danskt gjaldoyra, ella skal ta› framvegis ver›a krónan, sum hevur tænt dønum sí›ani 1875?

Strí›ast til ta› sí›sta

Sjáldsamt hevur veri› at eyglei›a n‡ggju samgongurnar, sum eru skipa›ar í donskum politikki seinastu vikurnar. Men hóast hesar løgnu fylkingar, og hóast allir teir stóru flokkarnir í Danmark mæla veljarunum til at atkvø›a ja, so er ósemjan millum veljararnar eins stór og millum ja- og nei-sí›una í sjálvum Fólkatinginum.

Eingin torir at spáa um endaliga úrsliti› í kvøld. Besta bo›i› frá serfrø›ingum, sum ikki gera anna› enn at greina veljarakanningar, er, at ta› ver›ur sera tætt millum ja- og nei-sí›una, tá i› úrsliti› er greitt. Men hetta n‡tist eingin serfrø›ingur at fortelja hvørki donsku veljarunum ella donsku politikkarunum. Øll vita, at ta› ver›ur javnt eins og so ofta fyrr, tá i› ES-spurningar hava veri› til atkvø›ugrei›slu. Og tí strí›ast bæ›i ja- og nei-sí›an vi› hond og fót fyri sínum sjónarmi›um, líka til valhølini lata aftur klokkan 20 í kvøld.

Eingin vil lúta

Danski forsætisrá›harrin hevur ongan hug at vakna í morgin og noy›ast at ásanna, at valstrí›i› miseydna›ist. Líka so lítlan hug hevur Holger K. Nielsen til at vakna og noy›ast at ásanna, at krónan ver›ur burtur um nøkur fá ár.

Ikki tí – ta› er kanska ikki evruni sjálvari, sum Holger K. Nielsen ber so stóran ótta fyri. Óttin liggur meira í tí, sum fylgir vi› evruni og tí framtí›ar ES, sum fleiri lei›andi evropeiskir politikkarar hava skitsera› og alment bo›a› frá.

Londini í ES skulu samstarva á fleiri økjum enn í dag. Og tær stóru politisku avger›irnar á fleiri økjum skulu í framtí›ini takast vi› vanligum meirilutavali›. Londini skulu ikki eins og í dag hava s‡tingarrætt, tá i› tær stóru avger›irnar skulu takast. Og hetta ræ›ir nei-sí›una meira enn naka›. Danmark fer ikki at hava nakra ávirkan á gongdina, um avger›irnar skulu takast vi› meirilutavali, stúrir nei-sí›an fyri.

Hetta er ta›, sum nei-sí›an hevur koyrt har›ast á í valstrí›num higartil. Harmonisering er eitt or›, sum gongur aftur í ES-høpi. Og ta› er hesari harmonisering, sum Holger K. og hinir neisigararnir ikki vilja síggja.

Danmark skal í framtí›ini sjálvt gera av, hvussu stórt skattatr‡sti› skal vera. Eingin uttan fyri Danmark skal áseta, hvussu stór fólkapensiónin ella a›rar almennar veitingar skulu vera. Eingin skal hótta ta› danska vælfer›arsamfelagi›, krevur nei-sí›an.

Drignir uppí

Nei-sí›an stúrir fyri, at eitt ja í dag er ta› sama sum at geva ES grønt ljós til at gera júst sum felagsskapinum lystir. Endin ver›ur, at Danmark hvørvur sum land, og at fólki› missur sín tjó›skaparliga samleika. Sjálvsavger›arrætturin ver›ur fluttur av Christiansborg ni›ur til Bruxelles, og so lí›andi ver›a ta› bert Teir Sameindu Evropeisku Statirnir eftir.

Siga veljararnir »ja« í dag, so kunnu teir vera vísir í, at ta› ikki gongur long tí›, á›renn teir aftur skulu á val og taka stø›u til, um Danmark skal fara upp aftur longur inn í evropeiska samstarvi›, ávara mótstø›ufólkini. Men vi› at siga »nei« í dag, sendir danska fólki› ein bo›skap til politikkararnar og restina av ES um at ste›ga á eina løtu. Ta› gongur ov skjótt, og politisku ætlaninar eru ikki í trá› vi› ynskini hjá fólkinum, ljó›ar áheitanin frá nei-sí›uni.

Møsn

Allar hesar póstandirnar, hevur veljarin l‡tt á í tolni seinastu vikurnar. Og líka so hart, sum nei-sí›an hevur rópt og ávara›, líka so hart hevur ja-sí›an ávara› og víst aftur póstandum frá hinum vonginum. Ta›, sum

nei-sí›an førir fram, er møsn og hevur einki vi› atkvø›ugrei›sluna í dag at gera. Í dag sn‡r ta› seg um evruna og limaskapin í Búskapar- og gjaldoyrasamgonguni.

Spurningurin um, hvørja lei› ES gongur, hoyrir ikki heima í hesum valstrí›num, og á stóra veljarafundinum hjá Danmarks Radio t‡skvøldi› lova›i Nyrup vegna Danmark at brúka s‡tingarrætt sín, um spurningurin um at pilka vi› danska vælfer›arsamfelagi› kemur á ES-bor›.

– Danmark fer ikki at taka undir vi› nøkrum, sum beinlei›is ella óbeinlei›is ávirkar rætt okkara at reka vælfer›arpolitikk, seg›i danski forsætisrá›harrin.

Og ver›ur talan um at lata ein størri part av sjálvsavger›arrættinum frá sær, so skal spurningurin undir øllum umstø›um til fólkaatkvø›u, vísir ja-sí›an á.

Evran í bakgrundina

Á seinasta stóra valfundinum í Danmarks Radio var líti› tosa› um ta›, sjálvt vali› sn‡r seg um – evruna. Og ta› hevur sermerkt alt valstrí›i›, at evran í fleiri førum er skúgva› til viks, og spurningarnir um framtí›ina hjá ES sum heild eru tiknir framum.

Men tá tosi› hevur snú› seg um evruna, hava politikkararnir somulei›is veri› rúkandi ósamdir um tær beinlei›is avlei›ingarnar. Flokkarnir hava kappast um at ræ›a og lokka veljararnar.

Danska stjórnin vil vera vi›, at ta› er høpisleyst at standa uttanfyri. Í dag luttekur Danmark í 1. og 2. stigi av Búskapar- og gjaldoyrasamstarvinum. Ta› vil millum anna› siga, at Danmark hevur bundi› seg til ikki at hava ov stórt hall á fíggjarlógini, almenna skuldin má ikki fara upp um eitt ávíst mark, og inflatiónin má ikki ver›a ov høg. Harafturat luttekur Danmark í tí partinum, sum sn‡r seg um fría flutningin av kapitali millum ES-londini.

Krónan er í stóran mun kn‡tt at evruni, og Evropeiski Mi›bankin, i› er bankin hjá evru-limalondunum, hevur bundi› seg til at sty›ja krónuni, um hon kemur undir tr‡st. Afturfyri skal Danmark halda ávísar treytir um búskaparpoltikkin, og vir›i› á krónuni má ikki víkja ov nógv frá vir›inum á evruni.

Tá i› ta› kemur til sjálvan gjaldoyra- og peningapolitikkin er Danmark kortini uttanfyri sjálva samgonguna.

Men stø›an hjá Danmark er í veruleikanum so lík stø›uni hjá evru-londunum, at einasti munur er, at evrulondini kunnu ikki áleggja Danmark at gjalda bøtur, um landi› ikki heldur seg innan fyri tey ásettu markini. Tí er ta› ó›amannaverk ikki at taka stigi› fult út og fara heilt uppí samstarvi› vi› hini 11 evrulondini, sigur ja-sí›an.

Fyrimunirnir vi› at fara uppí eru, at Danmark ikki situr uttan fyri fundarhøli›, tá evru-londini vi›gera mál av felags áhuga – mál i› so ella so eisini vi›víkja Danmark.

Fyrimunir í milliardaklassanum

Afturat hesum koma allir teir beinlei›is búskaparligu fyrimunirnir vi› at hava sama gjaldoyra sum 11 onnur lond og umlei› 300 milliónir evropearar, vísir ja-sí›an á.

20 milliardir meira til privata n‡tslu og í danska statskassan, hava Mogens Lykketoft og Marianne Jelved lova› dønum, um teir siga ja. Onnur halda, at búskaparligu fyrimunirnir hava eitt nógv størri vir›i enn 20 milliardir. Hinvegin sigur ja-sí›an, at eitt nei kann kosta dønum nógvar milliardir krónur. Rentan fer upp, arbei›sloysi› veksur, og framlei›slan minkar, um danir siga »nei«, ávara vi›haldsfólkini.

Póstandirnir hjá nei-sí›uni ganga sjálvandi ímóti hesum ræ›usøgunum. Eingin orsøk er at óttast hægri rentu, og umheimurin hevur so miki› stórt álit á Danmark og donsku krónuni, at danski búskapurin ikki kemur undir tr‡st.

– Lat okkum ikki taka eina endaliga avger› nú. Lat okkum fyrst síggja, hvussu ta› fer at gangast evruni, og so kunnu vit kanska koyra spurningin út til fólkaatkvø›u aftur seinni, sigur nei-sí›an, sum millum anna› vil bí›a og vita, um Svøríki og Bretland einafer› seinni fara at taka undir vi› evruni.

Holger K. Nielsen er ein teirra, sum hevur gloppa› dyrnar.

– Um evran mennnir seg á ein demokratiskan hátt, so kann vera, at vit skulu umhugsa spurningin einafer› afturat, seg›i hann t‡sdagin.

Um hetta ver›ur tann gularótin, sum fær veljaran at vraka evruna í dag, er ógjørligt at siga, men ta› ver›ur tann parturin, sum hevur størsta áliti› millum veljaran, sum ber sigurin í hús.

Eingin hjálp frá serfrø›ingum

Teir nógvu serfrø›ingarnir, sum hava veri› frammi í fjølmi›lunum í valstrí›num, kunnu heldur ikki hjálpa tí ivandi danska veljaranum. Fjølmi›larnir hava b‡tt tí›ina so hjartaliga millum teir bá›ar partarnar, og serfrø›ingarnir standa eins spjaddir í sínum sjónarmi›um og politikkararnir. Vísur ein serfrø›ingur á fyrimunir vi› einum ella ø›rum, kemur ein annar í somu løtu og vísur á vansan vi› júst tí sama. Veljarin hevur ta› ikki lætt.

Men nógv bendir kortini á, at valluttøkan ver›ur av teimum heilt stóru í dag. Nógv fleiri enn vanligt hava atkvøtt vi› brævatkvø›u, og hetta ver›ur tulka› sum eitt tekin um, at valluttøkan ver›ur stór.

Danir hava so eitt val, og hendan demokratiska rættin vilja teir sleppa at brúka í dag. Ta› eru ikki allir borgararnir í evru-londunum – eitt nú T‡sklandi – sum yvirhøvur hava fingi› møguleikan at siga anna›hvørt »ja« ella »nei« til evruna. Har hava stjórnirnar einsamallar tiki› avger›ina og ikki spurt fólki› um »sína« hugsan.



Hóast danir siga ja í dag, so koma se›larnir og myntirnar vi› Margrethu drotning á a›rari sí›uni ikki í umfar fyrr enn 1. januar 2004. Krónan ver›ur sostatt gjaldoyra í meira enn tr‡ ár afturat

Mótstø›ufólkini móti evruni stúra fyri, at evran bert er eitt stig móti Sameindu Evropeisku Statunum. Danmark hvørvur sum land, og avger›arrætturin ver›ur fluttur ni›ur til Bruxelles

Mynd: Jens Kr. Vang